

Óli Jacobsen
olijacobsen@post.olivant.fo

Ejler Djurhuus:

# Tá ið skotið varð eftir sýslumanshúsinum

**Ein uppgáva hjá sýslumonnum var at skipa fyri grindabýtinum. Hetta kundi fáa sinnini í kók. Meira dramatiskt var tað tó, tá ið skotið varð eftir sýslumanshúsinum**

Í seinasta parti varð greitt frá eini grind í Hvalba. Eg minnist serliga eina aðra grind í Hvalba. Tað var ordiligt illveður. Har vóru eisini skúvoyingar. Eg veit ikki hvussu teir vóru komnir, so ringt var veðrið.

Eg var eisini í grindini og stakk ein hval, og tá eg stakk fór økslin úr lið. Eg hevði sera ilt. Vit settu so inn á gomlu kaiina. Tá standa átta mans á kaiini og bíðaðu eftir mær, millum hesar vóru eisini skúvoyingar. Tá hugsaði eg, at teir vilja nokk hava sína grind beinanvegin. Eg kom so uppá kaiina. Tá sigur ein við meg, at »vit eru nakrir mans úr Skúvoy, sum eru her við báti. Kundu vit fingið okkara grind beinanvegin. Vit hava langan veg heim.«

Eg segði, at hetta bar ikki til, fyrr enn grindin var merkt. Jú, jú tað var einki at gera við tað.

Sum eg fari víðari, so sigur næsti maður akkurát tað sama um at fáa teirra grind beinanvegin. »Hoyrdi tú ikki, hvat eg segði við hann.« »Jú, men hatta segði tú ikki við meg!«

Tað var ikki gott nokk, at eg hevði sagt tað við hin bygdarmannin í somu støðu. Tá kom triði maðurin og spurdi um akkurát tað sama. Men hann fekk eisini sama svar.

### Ørur í grind

Eg upplivdi fleiri grindir bæði sunnanfyri og í Klaksvík. Tá kundi eg síggja, at fleiri menn kundu blíva púra frá sær sjálvum. Ein, sum seinni bleiv grindaformaður, segði, at »bert eg hoyri orðið grindaboð, tá sýgur tað so at hjartanum.« Eg segði, at tað kundi eg als ikki skilja. Men mangur hevði tað á tann hátt.

Tað var eisini ein søga um ein grindaformann, sum stóð á trappuni og deildi seðlarnar út. Tá hevði ein grindamaður blakað ein grindaknív eftir sýslumanninum, sum stóð dygst við, og hann kom at standa í durastólpan.

### AT – stjórin slapp at koyra fiskaprísirnar niður

Tað er nokk so nógv skrivað um AT, Arbejdernes Trawlerdrift, í røðini í Miðvikuni við Gerdu Einarson.

Hetta var tann stóra fyritøkan á Tvøroyri í eini 15-20 ár frá seinnapartin av 30-unum til fyrrapartin av 50-ununum. Tað gekk eisini væl hjá teimum tey nógvu av hesum árunum.

Hetta var jú ein »javnaðarfyritøka«, sum ikki varð rikin á júst sama hátt sum aðrar fyritøkur. Meginpartin av tíðini var Hjalgrim á Heygum stjóri. Hann var sonur tann kenda framburðsmannin Ólav av Heygum í Vestmanna.

Men umframt stjóran var eitt driftsráð við politiskum umboðum og úr fakfelagsrørsluni. Her kundi stríð vera millum áhugamálini hjá fyritøkuni og politisku áhugamálini hjá driftsráðnum. Hetta gjørdi tað ikki altíð lætt hjá Heygum, sum hann var kallaður.

Eina ferð hevði driftsráðið sett sær fyri, at nú skuldu fiskaprísirnir upp hjá útróðrarmonnum. Hesum var stjórin hart ímóti. Sum var, var tað júst javnvág millum inntøkur og útreiðslur, so ráðini vóru ikki til tess.

Men her var eingin bøn. Fiskaprísurin skuldi upp, og hetta varð eisini samtykt av driftsráðnum.

Seinni kundi Heygum svart uppá hvítt vísa á, at nú gav útróðrarfiskurin hall. Tað skilti driftsráðið nú væl. Men nú prísurin skuldi niður, mátti stjórin sjálvur gera tað! So kundi hann eisini fáa skolurnar!

### Skotini móti sýslumanshúsini

Ein onnur hending var, tá ið tað var skotið inn í sýslumanshúsini. Hetta var 20. november 1955 í tíðini, tá læknastríðið í Klaksvík var í hæddini. Tá vóru staddir á Tvøroyri tveir kriminalpolitistar frá politinum í Klaksvík, sum vóru komnir suður her fyri at kanna eitt innbrot, sum hevði verið. Hetta var so hent beint áðrenn hesa skjótingina. Teir fingu so hetta mál afturat.

Tá ið hetta hendi var eg inni við Rangá. Eg var farin heim um klokkan fimm, og hetta hendi um ein hálvan tíma seinni.

Marius, húskallurin, var farin at kasta nót. Vit áttu part í hesi nót. Hetta gjørdist tað største nótakastið, sum hevur verið her á fjørðinum. Teir fingu uppí 28 bátar av stórseiði í einum kasti. Hetta var uttanfyri ta gomlu kaiina, har flakavirkið seinni varð bygt.

Hetta nótakast gjørdist ein stórur partur av notatunum hjá politistunum frá hesi skjóting. Øll tey vitni, sum vórðu avhoyrd, vóru antin á veg oman á kaiina at síggja nótakastið ella vóru tey á veg niðan aftur.

Hesir kriminalpolitistarnir høvdu ongantíð sæð ein seið fyrr og vónaðu ikki at síggja ein slíkan aftur, sum hesin seiður kom at ørkymla hetta mál.

Tað sum hendi var, at mamma stóð frammanfyri køksvindeyganum, tá tað smella eini seks skot. Hon ansaði ikki í fyrsta umfari, hvat hetta var fyri nakað. Hon hoyrdi bert ljóðið av skotunum og trúði, at hetta var fýrverk. Hon sansaði als ikki, at skotini komu ein metur yvir henni. Skotini komu inn í eitt kamar uppi yvir køkinum.

Ikki fyrr enn morgunin eftir, sá Marius, at tað var skotið inn í kamarið hjá honum.

Hjá okkum búði tá eisini Hildur, eitt systkinabarn mítt, sum 12-13 ára gomul kom til okkara at búgva. Mamma hevði spurt Andrias í Heiðunum, beiggja sín, um hon ikki kundi fáa eina gentu at vera hjá okkum, nú hon var einsamøll í húsi. Hann áttu 9 børn. Jú, hon kundi fáa Hildur, tí hon longdist ikki so illa. Á tann hátt kom hon í húsið.

Morgunin eftir fer mamma at mjólka. Marius er í køkinum. Tá sigur hann: »Tey hava verið inni í kamarinum og órudda tað.«Mamma raknar eitt sindur við. Tað var tá løgið.

Hildur var tá hjá eini vinkonu hjá sær, beint tá hetta hendi. Tær gingu í klassa saman. Tá fer hon at hyggja at hesum óruddinum. Tá sær hon, at loftið er skrætt, og at hol er í. Flísar eru eisini farnar. Eitt borð, sum stóð í einum horni, var knúsað sundur. Tá ringir Hildur til mín og sigur, at her er okkurt galið, tí her er alt ein hurlivasi uppi á kamarinum. Eg minnist kortini ikki, um hon segði nakað um skjóting.

Eg fór á staðið, og tá sá eg, at tað uttan iva varð skotið við maskinbyrsu.

Tá fingu vit frá Klaksvík tveir kriminalpolitimenn, og teir høvdu hund við sær. Vit roknaðu við, at viðkomandi hevði skotið, har vegurin gongur omanfyri húsini. Har var eitt transformatortorn, og viðkomandi kann hava staðið aftanfyri har og skotið. Politistarnir komu so við hundi, og so fóru vit at leita. Vit leitaðu uppi á vegnum, men vit kundu ikki finna nøkur patrónhylstur. Vit krússaðu aftur og fram, og hundurin snoddaði somuleiðis. Vit koma niðan á Hválin, sum tað verður kallað, omanfyri kirkjuna, tað er ein hamari. Har stóðu vit og hugdu og tosaðu um, hvar í víðu verð maðurin hevur staðið ella ligið.



Dimmalætting
Amtstidende for Færøerne
78 AARGANG
ONSDAGEN DEN 23. NOVEMBER 1955

**Bumbuspreinging í Klakksvík. 3 politistar særdir –**

**»HOLGER DANSKE« og flesta politífólkið av Klakksvík týsdagin?**

Hákun Djurhuus fandt i sin Kælderkamin: inde i bragt en Blikæske med ca. 1 kg Dynamit. Den Lunte snor sig hen ad Gulvet.

**Den uhyggeligste Weekend Færøerne endnu har oplevet**

Fire Pistolskud affyredes Fredag Aften ind i Lagmand Kristian Djurhuus' Bopæl i Tverna

**Forhandle eller købslaa**

**Politiet og Klaksvig**

Pashaen af Marakesh, El Glaoui, paa Knæ foran Sultan... han bad om Forladelse.

**Frankrig regner med ... Oprør i Marokko**

*Tað var drama í Føroyum í november 1955. Dimmalætting kundi tann 23. november bæði boða frá bumbubresti í Klaksvík og skoti móti sýslumanshúsinum á Tvøroyri, sum greitt frá í greinini Den uhyggeligste Weekend Færøerne endu har oplevet*



*AT yvirtók virksemið hjá J. Mortensen, tá ið tannn fyritøkan fór á húsagang í 1936. Hetta er handilin*